# Skeiðsdepilin

FØROYA HANDILSSKÚLI TEKNISKI SKÚLIN

## Skeið í heysthálvuni 2005

### Dugir tú at samskifta

**16 tímar, 17; 18. okt. - kl. 09.00-16.00**

Øll hava fyri neyðini at duga væl at samskifta bæði skrivliga og munnliga. Her er skeiðið, sum rykkir ullina úr munninum og vendir stílaskrivingini á høvdið.

**Kostnaður: kr. 5.800,-** **Tilmelding: áðrenn 12. okt. 2005**

### Vitanarleiðsla

**24 tímar, 19; 20. okt. og 24. nov. - kl. 09.00-16.00**

Gongdin í nútímans samfelagnum fer meira tann vegin, at fleiri og fleiri starvsfólk fara at verða rópt vitanararbeiðarar. Í vitanarbúskapinum eru hesi starvsfólk tað sama sum førleikar, sum eitt virki ella stovnur má duga at gagnnýta og leiða, skal gott úrslit spyrjast burturúr.

**Kostnaður: kr. 6.800,-** **Tilmelding: áðrenn 13. okt. 2005**

### Grundleggjandi leiðaraútbúgving (bert fá pláss eftir)

**92 tímar, 24; 25; 26. okt. 21; 22. nov. 12; 13. des. + jan/feb 2006 kl. 09.00-16.00**

Útbugvingin vendir sær til nýggjar og komandi leiðarar. Vilt tú hava eitt størri leiðslufakligt støði, so er útbúgvingin nakað fyri teg. Royndir leiðarar, sum hava fingið nýggjar arbeiðs- og leiðslufunktiónir kunnu eisini taka hesa útbúgving.

**Kostnaður: 15.600,-** **Tilmelding: áðrenn 17. okt. 2005**

### Persónlig førleikamenning

**24 tímar, 3. og 4. nov. og 14.des. - kl. 09.00-16.00**

Endamálið er at fáa nøkur grundleggjandi amboð til persónliga planlegging m.a. við at læra at skilja ímillum og raðfesta ymisk sløg av uppgávum soleiðis, at tíð verður til tað, ið hevur týdning.

**Kostnaður: 4.900,-** **Tilmelding: áðrenn 25. okt. 2005**

### Coaching

**24 tímar, 21; 22. nov. og 9. des. - kl. 09.00-16.00**

Seinastu árini er vorðið alt greiðari, hvussu umráðandi tað er, at leiðarin kennir coach-amboðini.

Við tí professionellu samrøðuni sum amboð lærir leiðarin at arbeiða tilvitað við menning av sínum starvsfólkum. Øll kunnu læra at gerast ein góður coach.

**Kostnaður: kr. 4.900,-** **Tilmelding: áðrenn 14. nov. 2005**

### Projektleiðaraútbúgving (eyka skeið)

**48 tímar, 16; 17; 29; 30. nov. og 7; 8. des. - kl. 09.00-16.00**

Vegna stóran eftirspurning verður skipað fyri einum skeiði afturat í heyst.

Arbeiðir tú við projektum, ella ert tú projektleiðari, so er útbúgvingin nakað fyri teg. Skift verður ímillum modul, sum vara 2 dagar og heimauppgávur, sum taka støði í tínum egnu projektum, og sum samantvinna teori og praktiskt arbeiði.

**Kostnaður: kr. 9.600,00** **Tilmelding: áðrenn 8. nov. 2005**

**Lesið meira um skeiðini á *www.skeidsdepilin.fo* ella ringið 318813, tilmeldast kann beinleiðis á heimasíðuni.**

Marknagilsvegur 77, Postrúm 177, 110 Tórshavn
tel 318813, Fax 313374, info@skeidsdepilin.fo, www.skeiðdsdepilin.fo

---

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Barnaansingin í Tórshavnar kommunu



Í frítíðarskúlanum ganga uml. 65 børn og her starvast 7 fólk.

Tórshavnar kommuna søkir vegna:

**Frítíðarskúlan í Badmintonhøllini eftir:**
- einum pedagogi at arbeiða 25 tímar um vikuna at byrja skjótast til ber.
- einum køksfólki at arbeiða 25 tímar um vikuna at byrja skjótast til ber.

**Setanarviðurskifti**
Starvið sum pedagogur verður sett sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.
Starvið sum køksfólk verður sett sambært sáttmála við avvarandi yrkisfelag.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Jónu Johannesen, leiðara, tlf. 314902.

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Frítíðarskúlanum í Badmintonhøllini, Gundadalur, FO-100 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin 17. oktober 2005.

- onnur leys størv? Hygg á www.torshavn.fo

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. P/F 203,** P/F Føroya Termovirki, 100 Tórshavn.
**Viðtøkur broyttar:** 08.09.2005
**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Djóni Ziska, Agnethevej 22, 8680 Ry (nevndarformaður) Jonna Ziska, Sundsvegur 8, 100 Tórshavn (nevndarlimur) Andreas Ziska, Sundsvegur 8, 100 Tórshavn (nevndarlimur)
**Innkomin í nevndina:** Eyðbjørg Durhuus, Traðarvegur 19, 100 Tórshavn (nevndarlimur) Johanne Elisabeth Vestergaard, Marinargøta 19, 188 Hoyvík (nevndarlimur) Eyðfinnur Vestergaard, Marinargøta 19, 188 Hoyvík (nevndarlimur) Suni Durhuus, Traðarvegur 19, 100 Tórshavn (nevndarformaður)
**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:** Andreas Ziska, Sundsvegur 8, 100 Tórshavn
**Innkomin sum stjóri:** Eyðfinnur Vestergaard, Marinargøta 19, 188 Hoyvík
**Grannskoðari:**
**Farin frá sum grannskoðari:** P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 110 Tórshavn
**Nýggjur grannskoðari:** P/F Grannskoðaravirkið Inpact, statsaut. revisorar, R. C. Effersøesgøta 26, 100 Tórshavn

Skráseting Føroya
tann 29. september 2005

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. P/F 2903,** P/F Hansoft, 700 Klaksvík.
**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Jógvan Pauli Ziskason, á Brekku 53, 700 Klaksvík (nevndarlimur)
**Innkomin í nevndina:** Jón Rasmussen, Hamarssniðið 6, 700 Klaksvík (nevndarlimur)
**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:** Jógvan Pauli Ziskason, á Brekku 53, 700 Klaksvík
**Innkomin sum stjóri:** Jón Rasmussen, Hamarssniðið 6, 700 Klaksvík

Skráseting Føroya tann 29. september 2005

Kristin Balle

---

# Skúlin við Ósánna

**søkir við hesum eftir**

# 2 vaskifólkum

Arbeiðstíðin er 15 tímar um vikuna til fast ásettar tíðir á samdøgrinum.

Løn sambært fastlønaravtalu við Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til *Birgir Joensen skúlatænara, tlf. 21 67 04.*

Umsóknir verða at senda til:

Skúlan við Ósánna
Postboks 260
700 Klaksvík

í seinasta lagi mikudagin tann 12. oktober 2005.

**Klaksvíkar býráð**

---

# Aðalfundur

**Aðalfundur í Svimjisambandi Føroya, verður leygardagin 29. oktober 2005, kl. 11.00 umborð á M/F SMYRIL.**
**Møtt verður umborð í Tórshavn kl. 10.00**

Dagsskráin er hendan
1. Val av orðstýrara.
2. Starvsnevndarformaðurin leggur fram frágreiðingar frá virki sambandsins í farna ári.
3. Kassameistarin leggur fram granskoðaðan rokniskap.
4. Innkomin mál.
5. Val av nevndum og eykamonnum.
6. Ymiskt.

Møgulig uppskot til aðalfundin verða at senda til starvsnevndina innan 14. oktober 2005.

*Klaksvík, tann 29. september 2005*
**Vegna starvsnevndina**
**Palli Ziskason, formaður**

---

# MERKISDAGAR

Við at ringja 809022 kanst tú senda heilsanir við fjarriti, sum er ein vøkur heilsan á snøggum pappíri.

Í dag verða øll fjarrit send móttakaranum við posti.

Nærri fæst at vita á:

**FJARRIT**
Tel 80 90 22

FØROYA TELE
**www.tele.fo - tel 30 30 30**